# Miðvikan

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



Fiskimannasøgan í Íslandi:

# Allir hava krokað undir Langanesi

**Langanes er meira enn annað ímyndin av Íslandi hjá føroyskum fiskimonnum. Nesið var markið millum Eysturlandið og Norðurlandið, so flestu fiskimenn mundu sigla framvið Langanes fleiri ferðir árliga**

**3. partur**

Í hesum síðsta partinum av frásøgnini frá íslandstúrinum við Norrønu skal greiðast nakað frá okkara søgu í samband við Langanes.

Hetta nesið plagdi ein at undrast á í skúlanum. Á landakortinum líktist tað eini dunnu. Longu sum 14 ára gamal kom eg sum sluppfiskimaður at kroka undir Langanesi. Seinni komst eftir tí týdningi, sum hetta land, hetta nes og hesin landspartur hevur havt fyri Føroyar og føroyingar.

## Bakkafjørður

Bakkafjørður er beint sunnanfyri Langanes, og her sæst nesið í góðum sýni. Bakkafjørður hevur havt ein avbera stóran týdning fyri føroyingar. Tí er tað eisini sera náttúrligt at vitja Bakkafjørðin á eini ferð sum hesari.

Fyrst var vitjað í Skeggjastaðakirkju, sum liggur hinumegin víkina har bygdin er. Hetta kann tykjast at vera óhøgligt, og fólk hava fyrr farið í kirkju við báti. Men her hevur kirkja verið í øldir, og slíkt verður ikki broytt.

Í kirkjugarðinum fanst eisini grøv hjá føroyingi, Liða Johanna, úr Norðragøtu. Hon var fødd í 1859 og doyði í 1944. Hon fekk eitt barn í Føroyum, fór so til Íslands, har hon giftist og fekk tvey børn. Sonurin Jónas kom til og fekk eina stóra ætt. Onkur er eisini endað aftur í Føroyum. Ein ommusonur við konu, sum búði á Vopnafirði, komu til Bakkafjørðin til føroyska ferðalagið.

Kaj í Bartalstovu, sum var við á báðum ferðum, róði út á Bakkafjørðinum í 1944. Hann minnist Johannu, sum tá var eitt sindur í barndømi, hon gekk runt í bygdini og spurdi eftir »færeyingum.«

Í kirkjuni greiddi presturin Brynhildur Óladóttir frá kirkjuni og bygdini. Eftir vitjanina í kirkjuni bjóðaði prestur saman við kommunustýrinum til pannukøkur í skúlanum á Bakkafjørðinum. Síðan fingu luttakararnir møguleika fyri at síggja umstøðurnar hjá føroyskum útróðrarmonnum í teimum døgum, táið tað vóru fleiri føroyingar enn íslendingar í bygdini, sum greitt frá í fjør heyst.

Bakkafjørður er nú ikki tað, sum hann hevur verið. Her búgva bert 80 fólk. Men hóast hetta er ikki vandi fyri, at bygdin doyr út í næstu framtíð. Her eitt flakavirki, sum gevur fitt av arbeiði. Eisini er skúli við einum 20 børnum, sum skuldi kunnað tryggja framtíðina hjá bygdini. Men neyðugt er at hava bil, tí ruta finst ikki til bygdina uttan skúlakoyring.

Presturin Brynhildur er ein sera virkin kvinna. Umframt at vera prestur er hon lærari. Hon er eisini bóndi umframt at hava fýra børn í aldrinum 5-10 ár.

Aftaná vitjanina hjá føroyska ferðalagnum kom prestur eitt legg til Føroya, har tað gjørdist møguligt at løna henni eitt sindur av blíðskapinum aftur. Vitjanin gekk tó ikki heilt eftir ætlan, tí hon lá »øskuføst« í tveir dagar.

Frá Bakkafjørðinum var farið til Vopnafjørðin einar 30 km sunnari, har hugt var eftir, hvar føroyingarnir róðu út. Her vóru eisini føroyingar á staðnum frásøgufólk.



*Kaj í Bartalstovu t.v. minnist Jóhonnnu frá hansara útróðri á Bakkafjørðinum í 1944. Her er hann saman ommusoni hennara Julius Jónasson og konu hansara Onnu Benadiktsdóttir*



*Ein føroyingur, sum endaði sínar dagar á Bakkafjørðinum var Johanna úr Norðragøtu. Teksturin á gravsteininum er:*

*HER HVÍLIR*
*JÓHANNA MARIA*
*JANUSDÓTTIR*
*FRÁ FÆREYJUM*

*F. 15.3.1859*
*D. 2.11 1944*

*BLESSING SÉ*
*MINNING HENNARA*

## Í Íslandi er eisini ein Tórshavn

Bakkafjørður er í kommunu við Thórshøfn, sum liggur norðantil á Langanesi.

Hvussu stórt Ísland er, og hvussu lítið fólk er á hesum leiðum sæst av tí, at kommunan hevur 500 íbúgvar á einum øki, sum er eins stórt og allar Føroyar.

Tað er í Thórshøfn at farast skal í ørindum av ymiskum slagi. Hetta er eisini galdandi fyri eldru flokkarnar í skúlanum. Men skal rættuliga keypast inn má farast enn longur sum til Akureyri.

Thórshøfn hevur flogsamband til Akureyrar fimm ferðir um vikuna, og haðani slepst til Reykjavíkar. Tað er eisini busssamband til Akureyrar tvær ferðir um dagin. Hendan ferðin tekur 5 tímar.

Thórshøfn er ein – sjálvt eftir føroyskum viðurskiftum – lítil fiskivinnubygd. Her búgva umleið 400 fólk.

Her er eitt flakavirki við tilhoyrandi bátum. Á flakavirkinum arbeiða eini 100 fólk.

Tað kemur nakað av ferðafólki til Thórshafnar. Hiðani verður eisini skipað fyri útferðum út á Langanes, og eftir myndunum at døma er her avbera vakurt við einum ríkum fuglalívi. Her er eisini nógv um at fara, tí Langanes er 40 km langt.

Thórshøfn liggur við Thistilfjørðin, og er seyðahald grundarlagið fyri búsetingini. Her er tað vanligt, at fólk koma langa leið at luttaka í seyðarakstri.

## Skálar

Kendasta pláss hjá føroyingum á Langanesi man vera Skálar, sum er uttanvert sunnantil á Nesinum.

Tað er gjørt eitt rættuliga stórt kanningararbeiði av Skálum. Tað eru Fanney Kristjansdóttir og Sif Jóhannesdóttir, sum hava staðið fyri hesum. Tað var Sif, sum greiddi føroyska ferðalagnum frá søguni, og sum eisini gav mær sjálvum tilfar, sum er grundarlagið fyri hesi frásøgnini.

Á Skálum róðu nógvir føroyngar út, upp til 50-60 bátar. Skálar vórðu eisini nógv vitjaðar av føroyskum skipum, sum royndu á grunnunum

Framhald á síðu 16, 33 og 34